## Ónøgd um Carlsberg

Enskir miðlar skriva, at Liverpool nú vil hava eina sponsor-avtalu, sum er eins stór, sum tann, ið í Manchester United júst hevur skrivað undir við tryggingarrisan, Aon. Tann avtalan sigst geva ensku meistarunum á leið 700 milliónir næstu fýra árini, og nú krevur Liverpool, at Carlsberg skal rinda eins nógv, um teir framhaldandi vilja prýað búnarnar hjá felagnum. Mett verður, at verandi avtalan gevur Liverpool á leið 60 milliónir krónur um árið.

## Dystaryvirlit

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 25.06 | HB-B36 | Eiler Rasmussen |
| 25.06 | B68-NSÍ | Georg N. Rasmussen |

## Voda-fone-dystir á »Den lange«

**Dystirnir millum HB-B36 og B68-NSÍ vera á veddingarseðlinum hóskvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Hóskvøldið verður talan um tvey lokalbrak í vodafonedeildini. Í Havn tekur HB ímóti B36, og á Toftum tekur B68 ímóti NSÍ. Men nú er ein eyka spenningur komin uppí leikin.

Fólk kunnu nú fara inn til ein umboðsmann hjá Danske Spil og vedda uppá hesar báðar dystirnar. Og oddsini eru nú klár. Taka vit dystin millum HB og B36 í Havn, so eru oddsini uppá HB-sigur 1,33, oddsini uppá javnleik eru 4,10, meðan oddsini uppá B36-sigur eru heili 6,50. Danske Spil væntar, at tað verður heldur javnari millum B68 og NSÍ á Toftum. Danske Spil hevur odds 2,55 uppá B68, odds 3,10 uppá javnleik, og odds 2,30 uppá NSÍ, sum sostatt er ein lítil favorittur. Um veddað verður uppá javnleik í báðum dystum, so verður samlaði oddsið 12,71.



*Tróndur Arge og Hilmar Jan Hansen fara at siga frá báðum dystunum á Rás2 í kvøld.*

# Elektron sendir Rás2 til Álands

**Elektron og Rás2 hava gjørt sponsoravtalu, sum er við til at tryggja fíggjarliga grundarlagið fyri manssterka oyggjaleikaliðnum hjá Miðlahúsinum**

ÍTRÓTTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Sosialurin og Rás2 hava seinastu vikuna gjørt vart við metstóra oyggjaleikaliðið, sum verður sent at siga frá og skriva um oyggjaleikirnar, sum byrja um vikuskiftið.

Hjá Rás2 er einasta inntøkugrundarlagið lýsingar- og sponsorinntøkur, og í gjár varð sponsoravtala undirskrivað við Elektron, sum verður høvuðssponsor fyri sendingunum úr Álandi.

- Vit halda hetta ljóðar sum eitt sera spennandi, og vit eru ein frísk fyritøka, sum gjarna vil spæla við í hesum, sigur Dánjal Samuelsen, marknaðarsamskipari hjá Elektron.

- Sjálvandi vilja vit eisini hava nakað afturfyri. Elektron hevur áhuga í at verða ein meira sjónlig fyritøka í Føroyum. Fyrr hevur tað ikki verið eitt áhugamál hjá okkum ella eigarunum, men í dag er fyritøkan í broyting. Vit hava víðkað virksemið frá at vera ein veitari hjá bankunum og tí almenna til eisini at veita tænastur til vinnulívið í breiðari merking. Og tí vilja vit nú skapa okkum eitt image millum allar føroyingar, sigur Dánjal Samuelsen.

*Og tit meta Oyggjaleikirnar sum nakað, sum er til allar føroyingar?*

- Tað rokna vit avgjørt við. Serliga tí Rás2 hevur lagt nógv fyri og hevur lagt upp til eitt spennandi konsept at siga frá leikunum. Og tí vilja vit fegin verða ein partur av, sigur Dánjal Samuelsen.




*Dánjal Samuelsen, marknaðarsamskipari á Elektron, og Jákup Mørk, ítróttarredaktør í Miðlahúsinum og nevndarlimur í Rás2, skriva undir sponsoravtaluna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Vodafone-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 13 | 10 | - | 2 | - | 1 | 37 | 20 | 17 | 32 |
| 2 | Víkingur | 14 | 7 | - | 3 | - | 4 | 28 | 19 | 9 | 24 |
| 3 | B68 | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 26 | 21 | 5 | 24 |
| 4 | NSÍ | 13 | 7 | - | 2 | - | 4 | 29 | 22 | 7 | 23 |
| 5 | EB/S | 14 | 6 | - | 4 | - | 4 | 25 | 19 | 6 | 22 |
| 6 | B36 | 13 | 4 | - | 4 | - | 5 | 18 | 23 | -5 | 16 |
| 7 | AB | 14 | 4 | - | 3 | - | 7 | 12 | 21 | -9 | 15 |
| 8 | ÍF | 14 | 3 | - | 3 | - | 8 | 17 | 23 | -6 | 12 |
| 9 | KÍ | 14 | 2 | - | 5 | - | 7 | 15 | 24 | -9 | 11 |
| 10 | 07 Vestur | 14 | 1 | - | 5 | - | 8 | 21 | 36 | -15 | 8 |

## FAKTA um Vodafon-deildina

**EB/Streymur – Víkingur 1-0 (0-0)**
1-0 Pætur D. Jacobsen, 71.
**Dómari:** Ransin Djurhuus
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Levi Hanssen, Sorin Anghel (Pauli G. Hansen, 44.), Dánjal Davidsen, Leif Niclasen – Gudmundur Nielsen (Pætur D. Jacobsen, 62.), Bárður Olsen, Brian Olsen, Marni Djurhuus, Hans P. Samuelsen – Arnbjørn Hansen
**Gult kort:** Bárður Olsen
**Víkingur:** Geza Turi – Hjartvard Hansen, Sverri Jacobsen, Niclas Niclasen, Hanus Jacobsen – Andreas L. Olsen, Zoltan Bukszegi, Súni Olsen (Símun L. Jacobsen, 45.) (Bárður Hansen), Sølvi Vatnhamar, Hans Jørgen Djurhuus – Finnur Justinussen
**Gult kort:** Hans Jørgen Djurhuus, Símun L. Jacobsen
Av tí, at fjølmiðlaábyrgdarin hjá EB/Streymi ikki hevur latið blaðnum dómaraseðlarnar, er møguleiki fyri, at hesi hagtøl ikki eru fullfíggjað.

**07 Vestur – AB 0-0**
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**07 Vestur:** Trygvi Askham – Sjúrður Ellefsen (Karl Johan Djurhuus), Hans Arni Ellefsen, Ragnar Niclasen, Hendrik Rubeksen – Ricardo Da Silva Braga (Sigtór A. Petersen (Holgar Durhuus)), Eli F. Nielsen, Jóhan Petur á Stongum, Milan Pejcic, Tór Ingar Akselsen – Jens Erik Rasmussen
**Gult kort:** Jóhan Petur á Stongum, Hendrik Rubeksen
**Reytt kort:** Ragnar Niclasen (beinleiðis reytt)
**AB:** Tórður Thomsen – Tummas Justinussen, Tehe Aristide, Høgni M. Joensen, Janus M. Joensen (Alex Mellemgaard) – John Hansen, Evrard Blé – Kenneth Jacobsen, Jobin Drangastein, Rasmus Nielsen – Dánjal Rói Olsen (Nikolai Eriksen)
**Gult kort:** Evrard Blé, Dánjal Rói Olsen
**Reytt kort:** Jobin Drangastein (tvey gul)

**KÍ – ÍF 3-2 (2-2)**
1-0: Stefan Kalsø, 15.
1-1: Nenad Saric, 18.
2-1: John Hammer, 40.
2-2: Balazs Sinkó, 45.
3-2: Jógvan Isaksen, 90.
**Dómari:** Petur Reinert
**KÍ:** Jákup Mikkelsen – Jógvan Isaksen, Sørmund Kalsø, Oddmar á Lakjuni, Heðin á Lakjuni – Kristoffur Jakobsen, John Hammer (Leon Bjartalíð, 88.), Eli Simonsen (Ivan Joensen, 62.), Erland B. Danielsen, Niels Pauli Danielsen (Jón Jacobsen, 62.) – Stefan Kalsø
**ÍF:** Andras Gango – Áki Petersen, Viggo Johannesen (Balazs Sinkó, 22.), Poul Ennigarð, Jan Ellingsgaard – Dánjal á Lakjuni (Hanus Eliasen, 85.), Alexander Jovevic, Høgni Zachariasen, Andy Olsen – Nenad Saric – Bartal Eliasen